Nes Sóknar Ítróttafelag
Stovnað: 24.03.1957
FO-620 Runavík
Tlf. 448100/Fax 448566
Formaður: Jákup Mortensen

**Meistarar:** Ongantíð – Besta úrslit nr. 2 í 2002
**Steypavinnarar (2):** 1986 og 2002
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (17 ár):** 1976, 1979, 1984-1988, 1991-1992, 1994-1995, 1997-
**Í Europa:** Ongantíð

# Nú skal NSÍ royna altjóða veingirnar

**Seytjanda árið hjá NSÍ í bestu deildini var úrtøkan størri, enn hon nakrantíð áður hevur verið. Við finalusigrinum í steypakappingini tryggjaði felagið sær fyri fyrstu ferð nakrantíð rættin at taka lut í Europa Cup kappingini**

JÓANNES HANSEN


*Jónstein Petersen og hinir í NSÍ sleppa nú at royna seg í Europa.*

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað hevur ivaleyst kenst eitt sindur við síðuna av hjá teimum, sum eru góð við NSÍ. Teirra lið hevur ongantíð áður havt møguleikan at royna seg í europeisku kappingunum. Tað hava onnur feløg gjørt. Umframt tey so at siga sjálvskrivaðu KÍ, GÍ, B36 og HB hava eisini B68, B71 og VB tikið lut í Europa Cup, men tað hevur NSÍ úr triði størstu kommununi í landinum ikki gjørt. Men nú liggur vegurin opin út í Europa. Tá ið lutakastið til Europa Cup verður mitt í summar verður navnið á NSÍ í hattinum.

Teir hava í nógv ár luttikið við nógvum liðum í kappingunum í yngru deildunum. Teir vunnu FM í unglingadeildini1995, 1996, 1997 og í 1999, og teir vunnu dreingjadeildina í 1997. Men tað er ikki fyrrenn tey seinastu fimm árini, at NSÍ rættuliga hevur sligið sítt navn fast í bestu deildini. Í 1996 vunnu teir 2. deild fyri fimtu ferð, og teir í NSÍ halda seg tey seinastu árini á vøllinum hava víst, at tíðarskeiðið, tá ið teirra lið fer at flyta upp og niður millum bestu og næstbestu deildina, er liðugt.

Nú ræður tað um at vera við í kappingini um heiðursmerkini. Dreymurin er sjávsagt at vinna fyrsta FM heitið nakrantíð til Runavíkar. Tað verður torført, men í NSÍ hava teir síðani tíðliga á árinum miðvíst arbeitt við at fyrireika seg til landskappingina, steypakappingina og so Europa Cup avbjóðingina, sum er serlig gularót, men sum tað kortini ikki enn verður hugsað so nógv um. Tað hevði ikki verið so galið sum tað fyrsta føroyksa felagið at spælt seg víðari úr fyrsta innleiðandi umfarinum. Tað er ein góður dreymur at hava, men hvussu tað fer at hilnast á vøllinum valdast eitt nú, hvussu tað fer at ganga við lutakastinum.

Úrslitini í yngru deildunum í fjør kundu bent á, at tað sær heilt hampuligt út við tilgongdini til besta liðið komandi árini. Smádreingjaliðið vann FM kappingina, og bæði dreingjaliðið og smádreingjaliðið vunnu steypakappingina. Fótbóltsliga kjølfestan hevur ikki verið tann sama í NSÍ, sum hon hevur verið og er í eldru feløgunum. Men nú eru fleiri millum teirra, sum vinna nógv í yngru deildunum, sum eru synir hjá teimum, ið áður hava roynt seg í fremstu røð – bæði í NSÍ og í øðrum feløgum.

Jógvan Martin Olsen var høvuðsábyrgdarmaðurin aftanfyri liðið í 1. deild, sum í fjør vann silvurkrónur í landskappingini og gullkrónur í kappingini um løgmanssteypið. Hann stendur aftur við endan í ár, nú NSÍ skal verja borg og luttaka í Europa Cup. Í fjør høvdu NSÍ og Jógvan Martin eitt ára sáttmála, og tað hava tey aftur í ár.

Jens Martin Knudsen hevur høvuðsábyrgdina av øllum ungdómsfótbóltinum, umframt at hann framvegis verjir málið í 1. deild, og miðvallarin í 1. deild, Ian Højgaard, hevur síðani síðsta summar verið samskipari í felagnum.

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Jens Martin Knudsen | 18/-21 (1-0) | 56/-143 | GÍ, B36 |
| Jákup Emil Hansen | | | |
| **Verja** | | | |
| Messias Perreira | | | B68 |
| Áki L. Hansen | | | |
| Rúni Rasmussen | | | Skála |
| Sjúrður Jacobsen | 18/5 (1-1) | | |
| Óli Hansen | 18/6 (2-1) | | GÍ |
| **Miðvøllur** | | | |
| Jónstein Petersen | 18/4 (3-0) | | |
| Brynjolvur Nielsen | 15/1 (2-0) | | |
| Kári Hansen | 14/1 (3-1) | | |
| Eddie Mikkelsen | 7/0 (0-0) | | |
| Ian Højgaard | 18/0 (0-0) | | |
| Andy Olsen | | | |
| Justinus R. Hansen | 2/0 (1-0) | | |
| Eystein Skipanes | | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Gert Langgaard | 17/5 (0-0) | | LÍF |
| Helgi L. Petersen | 16/4 (3-0) | 4//0 | GÍ |
| Sonni L. Petersen | 17/5 (5-0) | | |
| Bergur Djurhuus | 5/0 (0-1) | | |
| **Frágongd** | | | |
| Arnfinn Langgaard | 18/1 (1-0) | Givin | |
| Djóni N. Joensen | 14/2 (1-0) | Givin | |
| Ulrik Balling | 4/4 (1-0) | Uttanlands | |
| Pól Thorsteinsson | 15/0 (2-0) | B36 | |
| **Tilgongd** | | | |
| Áki L. Hansen | | NSÍ | |
| Andy Olsen | | NSÍ | |
| Rúni Rasmussen | 16/0 (1-1) | Skála | |
| Messias Perreira | 15/0 (2-1) | B68 | |
| Eystein Skipanes | | Heim úr Danmark | |
| **Venjari** | | | |
| Jógvan Martin Olsen | | | |




*– At vit framvegis ongantíð hava vunnið meistaraskapin eigur at vera ein eyka motivatión hjá okkum, heldur Ian Højgaard, spælari og dagligur leiðari hjá NSÍ.*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Stigini skulu kosta minni

**Dreymurin um yrkisfótbólt er umvegis støðg frá øllum fótbólti vorðin til ein øðrvísi veruleika í NSÍ, har dagliga leiðarastarvið ber lønina við sær, meðan miðvallarplássið á besta liðnum verður røkt í frítíðini**

JÓANNES HANSEN

Ian Højgaard hevur síðani í juni í fjør verið dagligur leiðari í NSÍ. Arbeiðið fevnir stutt sagt um alt, sum hevur við felagið at gera. Samstarvið við FSF, kommununa og sponsorarnar gongur umvegis dagliga leiðaran, sum eisini hevur nógv onnur arbeiðsjørn í eldinum:

– At føroysk fótbóltsfeløg seta dagligar leiðarar hevur nakað við nýggju krøvini hjá UEFA at gera, og so hevur tað eisini víst seg at vera ein sannroynd, at virksemið í fleiri av feløgunum er vorðið so víttfevnt, at tað hevur borið illa til hjá nevndarlimunum at røkja alt í frítíðini. Hetta er eitt nýtt starv, og tað er fyri ein stóran part upp til mín sjálvan at fylla tað út.

*Hvat snýr tað seg mest um?*

– Ein av spurningunum, sum støðugt kroystir NSÍ og ivaleyst nógv onnur feløg, er tann fíggjarligi. Leiðslan í felagnum hevur stutt sagt gjørt av, at tað skal kosta nógv minni at reka felagið í ár, enn tað gjørdi í fjør. Tá var prísurin fýra hundrað túsund krónur hægri, enn inntøkurnar vóru, og tað ber ikki til. Tí skulu inntøkurnar økjast, og tað skal samstundis fáast væl meiri burturúr hvørjari útreiðslukrónu.

*Hvussu skal hetta gerast?*

– Vit royna at hava fleiri inntøkugevandi tiltøk í ár, enn vit høvdu í fjør. Og vit hava lagt okkum væl meiri eftir at stýra útreiðslunum. Dagligi leiðarin stendur fyri innkeypunum. At tað ikki eru fleiri, sum kanska gera somu innkeypini, eigur at hava við sær, at útreiðslurnar fara at minka. Tað er einki sum eitur, tað skulu tær.

*Vil tað siga, at tit ítróttarliga ikki stremba so høgt í ár, sum tit rukku í fjør?*

– Vit halda ikki, at stórt medvit um stýring av inntøkum og útreiðslum nýtist at vera tað sama sum lægri mál fyri ítróttarligu avrikini. Umstøðurnar hjá spælarunum eru tær somu, teir hava sama venjara, og teir venja eins ofta, og teir gjørdu í fjør. Tað er rætt, at vit hava mist nakrar av mest royndu spælarunum, men vit halda okkum hava tekningina til eina nýggja uppstilling.

### Royndi seg í Vejle

Ian Højgaard er 28 ára gamal. Hann var 17 ár, tá ið hann í 1992 fór til Danmarkar við tí fyri eyga at spæla fótbólt og helst at gera fótbóltin til sítt livibreyð. Hann fór á fótbóltsskúla í Vejle. Har var hann á unglingaliðnum, sum vann jyska meistaraskapin og sum vann bronsukrónur í DBU kappingini. Millum liðfelagarnar vóru nú heimskendi Thomas Gravesen, Kasper Dalgas, sum hevur verið í OB, og sum nú er liðfelagi hjá Jón Róa Jacobsen í Brøndby, Peter Christiansen, sum er vinstri vongverji í FCK, Jesper Søgaard, sum er í FCM og Alex Nørlund, sum spælir við superliguliðnum hjá AGF.

Ian var seinni á 2. liði, og hann var við í einum venjingardysti á superliguliðnum, men so steðgaði tað upp hjá Iani Højgaard í Vejle:

– Eg spældi yvirhøvur ikki fótbólt í nakrar mánaðir. Eg var fullkomuliga mettur av fótbóltinum. Liðfelagarnir vóru av fittastu fólkum, men staðfestingin hjá mær var, at eg hevði sera ilt við at trívast í einum umhvørvi, har allir kappast ímóti øllum. Eftir steðg í nakrar mánaðir fór eg aftur at spæla, men nú var tað við øðrvísi hugburði. Eg stríddist ikki so nógv fyri at koma á besta liðið, eg arbeiddi, og eg hevði annað at ganga uppí enn bara fótbóltin.

*Vart tú vónbrotin av, at tað ikki gekk, sum tú hevði droymt um?*

– Sammett við tað, sum eg fór av landinum til í 1992, so rakk eg avgjørt ikki málinum. Men mær dámdi væl á fótbóltsskúlanum, sum eg fekk nógv burturúr. At hugburðurin til fótbóltin broyttist bar við sær, at eg ikki kendi tað sum eitt tap, at eg ikki gjørdist yrkisspælari. Men eingin ungur drongur, sum hevur sama dreym, sum eg hevði fyri ellivu árum síðani, skal rokna við, at hetta er lættvunnið. Tað er beinhørð kapping, og tað eru fáir vinnarar og nógvir taparar.

### Fáir eru eftir

Tá ið Ian Højgaard í 1999 kom aftur til NSÍ, vóru fáir eftir av spælarunum, sum hann hevði spælt saman við sjey ár frammanundan, og í kappingarárinum 2003 er hann tann einasti, sum var við fyri ellivu árum síðani.

– Djóni N. Joensen var við í fjør og í 1992. Jens Martin var farin til Gøtu í 1992. Eg eri 28 ár, so tað kann ikki sigast annað, enn at tað hevur gingið skjótt at skifta liðið hjá NSÍ út. Liðið hevur verið í 2. deild í 1993 og í 1995, men nú er í so máta rættuliga vent í holuni.

*Hvussu langt fara tit at røkka í ár?*

– At vit framvegis ongantíð hava vunnið meistaraskapin eigur at vera ein eyka motivatión hjá okkum. Vit hava mist fleiri spælarar, men eg haldi, at tað hevur gingið sera skjótt at fáa nýggja liðið at rigga. Eitt nú eri eg imponeraður av, at fyrrverandi álopsspælarin, Óli Hansen, og brasiliumaðurin, Messias, so skjótt hava funnið saman í trygga miðverjueind frammanfyri Jens Martin Knudsen.

Sigur Ian Højgaard, dagligi leiðarin í NSÍ. Tá ið hann er á fótbóltsvøllinum, er hann undir somu treytum, sum allir hinir eru. Fótbóltsspælið er frítíðarítriv, og Jógvan Martin Olsen, venjarin, nýtist ikki at vísa serlig atlit til veteranin á miðvøllinum.